Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Makrelkvotur sum endurgjald fyri vantandi fiskiveiðiavtalu við ES

Spurningar:

1. Hvør er lógarheimildin og fyrisitingarliga heimildin fyri, at landsstýrismaðurin boðar frá í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, at hann fer at lata 10.000 tons av makreli í endurgjaldi til ávísar skipabólkar, tí at ongin fiskiveiðiavtala er gjørd við ES í 2021?

2. Hvør er tann sakliga og vigaða grundgevingin fyri hesi fyrisitingarligu avgerð og fráboðan, og hvør ítøkilig meting og skjalfesting liggur til grund fyri at boða frá endurgjaldi uppá 10.000 tons?

3. Hvørji ítøkilig skip ella feløg er talan um, ið skulu fáa hesar kvotur, og hvussu er uppgerðin gjørd og skjalprógvað í hvørjum einstøkum føri um, hvat tey skulu hava mist, orsakað av vantandi fiskiveiðiavtalu við ES?

4. Hvørji fordømi finnast í fyrisitingarlóg og -siðvenju fyri hesi avgerð, og hvørji fordømi fer henda avgerð at skapa mótvegis øðrum borgarum í landinum?

5. Sambært líkareglu, proporsjónalitetsmeting og sakligari viðgerð, hvussu nógv ætlar landsstýrismaðurin skal verða latið í sonevndum endurgjaldi til skipabólkar og borgarar, sum kunnu staðfestast at hava mist, orsakað av vantandi avtalu við Stórabretland, Noreg, Ísland, ES, og tey, ið hava mist orsakað av vantandi avtalum í t.d. NAFO, Irmingerhavinum, NASCO v.m. – bæði fyrr, nú og frameftir?

Viðmerkingar:

Í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya 18. september 2021, boðar landsstýrismaðurin frá, at hann fer at lata 10.000 tons av makreli til ávísar skipabólkar/feløg í sonevndum endurgjaldi orsakað av, at ongin fiskiveiðiavtala er gjørd við ES í 2021.
Sí hesa leinkju: Fáa makrel fyri mist fiskirættindi | Kringvarp Føroya (kvf.fo)
Landsstýrismaðurin sigur seg hava fingið staðfest, at hetta kann gerast við kunngerð, uttan nakra lógarbroyting.
Tí verður spurt, hvør heimildin er fyri hesi avgerð, og hvussu hon er grundað og skjalfest sambært lóg og fyrisitingarreglum. Hartil hvussu hon viðger borgarar í samfelagnum sambært líkaregluni og hvørji fordømi, hon skapar.

Á Løgtingi, 05. oktober 2021

Høgni Hoydal